# HJÁ HELFRID OG HELGA



**SETHÚS** – Ja, tað hevur tikið sína tíð at fáa hesi sethúsini liðug. Tað hava verið ávísir trupulleikar á vegnum, men nú síggja vit fram til at flyta inn í tey komandi summar, sigur Helfrid Poulsen av Eiði. Hon er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og starvast sum dagligur leiðari á Korndalsbýlinum í heimbygd hennara.

Snorri Brend

> Her hava øll tikið lut, eisini eg. Ja, eg havi sjálv verið við til tað mesta í arbeiðinum. Saman við millum øðrum pápa mínum havi eg bæði stoypt, lagt kloakk og nógv annað

**Eiði:** – Tað verður munur á, - at fara úr einum summarhúsum upp á 76 fermetrar til eini spildurnýggj hús uppá 180 fermetrar, sigur 34 ára gamla kvinnan, ið er gift við Helga Stefán Ingibjørnsson úr Íslandi.

Eins og so mong onnur ung hjún hava tey havt ein dreym um at kunna byggja síni egnu dreymahús á Eiði. Hesin dreymurin er nú við at gerast veruleiki yviri í Gjógv, sum tey staðkendu siga.

Her hava í eini 50 ár staðið eini summarhús, men á sama øki verða nú bygd eini munandi størri og øðrvísi hús. Eitt eyðkenni við húsunum er, at tað er formað sum bókstavurin H.

– Vit hugsaðu einaferð fyri mongum árum síðani um, at húsini skuldu hava høga reising. Seinni broyttu vit hugsan, til heldur at byggja tey í einari hædd í hesum náttúruvakra økinum.

– Tekningina gjørdu vit í 2005, men veitst tú hvat? Tá teir fóru undir at byggja tann nýggja barnagarðin her á Eiði, gjørdist eg sera kløkk, tá eg sá, hvussu gekk við tí arbeiðinum. Tað vísti seg at barnagarðurin líktist rættiliga nógv okkara húsum, sigur Helfrid við einum brosi.

Dreymurin um egnan bústað er nærri nú enn áður. Og leygardagin 6. november var dagurin komin, tá húsini vórðu reist.

– Nú ræður bara um at fáa tey innilokað sum skjótast. Og so gleða vit okkum til komandi summar, tá vit ætla at flyta inn í tey.

## Drúgt og dýrt

Helfrid er bæði fødd og uppvaksin her á Eiði, men hevur kortini ikki altíð búð í heimbygdini. Á yngru døgum búði hon á so ymiskum støðum sum á Kambsdali, í Íslandi, Onglandi og í Havn.

Eftir at Helfrid fann íslendska mann sín, og tey vórðu gift í 1999, fluttu tey norður higar at búgva – fyrst til leigu, meðan tey bæði so smátt tosaðu um, hvussu tey skuldu innrætta seg í einum framtíðar bústaði. Síðani tá hava tey fingið trý børn saman.

Tá tey hugdu rundan um seg í bygdini fullu eygu teirra á eini eldri hús - eini summarhús - sum tey vistu at onnur eisini áður høvdu havt áhuga fyri at keypa. Men eigarin hevði ikki áhuga í at selja.

– Vit hildu bæði, at vit ynsktu at keypa tey, tí tey lógu so væl fyri í vøkrum umhvørvi. Og nú vísti tað seg brádliga, at maðurin vildi selja okkum húsini, stóra grundøkið rundan um, og nøkur gyllin í jørð.

– Og tú kanst ikki ætla, hvussu glað vit vóru, tá vit fingu hesi boðini, sigur Helfrid við einum brosi.

Í framtíðardreymum sínum hugsaðu tey bæði um at byggja hesi húsini út, soleiðis at ein fekk meiri pláss til eina familju við børnum. Tey funnu tó skjótt útav, at hetta fór at gerast ein bæði drúgv og kostnaðarmikil loysn.

– Vit broyttu tí hugsan, og avgjørdu at byggja okkara egnu hús ístaðin. Eg haldi, at tað var tann rætta loysnin.

## Stoypt og kloakk

Sum hjá so mongum øðrum ungum hjúnum vóru nógv ynski, ið skuldi fáast at hóska saman til teirra dreymahús. Fyri at fáa greiðu á øllum hesum, og fyri at fáa byggiloyvi, máttu bæði umsókn og tekning sendast kommununi.

– Ja, vit sendu so eina umsókn til kommununa, har vit ikki bert høvdu teknað húsini, men eisini ein urtagarð við buskum og øllum tí, ið kravdist til eini slík vøkur og hugnalig hús, sigur Helfrid við einum brosi.

Tey fingu góða hjálp til at tekna húsini frá íslendska verfaðir hennara, sum veruliga dugdi sítt fak. Tíverri fyri tey øll sleppur hann ikki at síggja tað lidna úrslitið, tí hann andaðist nevniliga í farna mánaði.

Tekningin var av einum H-formaðum húsum við øllum tí, ið hoyrir til eini nútíðar hús, millum annað køki, fýra kømrum, trimum wc, einum boblibaði og annars stórum stovuvindeygum við einum frálíkum útsýni til bygdina, vatnið og Hólman.

Ein annar týdningarmikil lutur í byggingini var bjálvingin, har dentur varð lagdur á, at tey skuldu bjálvast við tí nýggjasta og tí besta. Og so løgdu tey eisini stóran dent á, at tey skuldu sjálvi gera sum mest av arbeiðinum.

Helgi er útbúgvin maskinsmiður og er fittur í hondunum; pápabeiggi Helfrid er timburmaður og onnur hava luttikið í arbeiðinum.

– Her hava øll tikið lut, eisini eg. Ja, eg havi sjálv verið við til tað mesta í arbeiðinum. Saman við millum øðrum pápa mínum havi eg bæði stoypt, lagt kloakk og nógv annað.

– Eg havi ikki hildið meg aftur, tí hetta skal jú gerast til okkara heim, slær Helfrid fast.

*snorri@sosialurin.fo*